Í fótafetum Robinsons

Fyrisøgn!

6. flokkur í Vági hevur søkt um at sleppa við til eina spennandi legu, ið verður í Vágum í juni mánaði. Hetta er ein lega við luttakarum úr fleiri ymiskum londum.

Endamálið við leguni er, at børnini skulu royna at ganga í fótafetum Robinsons, t.d. skulu tey sjálv syrgja fyri at gera sær bústað, skaffa sær mat og matgera, meðan lærarar í Vágum taka sær av ymiskum uppgávum, ið børnini skulu gera á leguni.

Høgnar vónar, at hansara flokkur sleppur á leguna, men hann veit, at nógvir flokkar í Føroyum hava søkt um at sleppa við. Hann hevur hoyrt, at 6. flokkur á Giljanesi skal vera við á leguni. Hetta er longu avgjørt, tí hesin flokkur verður vertsflokkur. Høgnar kennir tvey børn, ið ganga í 6. flokki á Giljanesi, Høgna og Silju. Tey hava sagt honum, at á leguni verður møguleiki fyri útferðum og kappingum, ið eru bæði spennandi og mennandi.